SUZUKI
Í FØROYUM

## Frá 1. juli 2004

fara vit at umboða **Suzuki** bilar í Føroyum.

Okkara aðalmál verður at hava eina stóra og fjølbroytta goymslu av nýggjum bilum, eina nøktandi eykalutagoymslu og góða tænastu.

Eyðbjørn Hansen hevur uboðað **Suzuki** síðan 1986.

Góð og lagalig tænasta hevur eyðkent Eyðbjørn, sum í byrjani kemur at verða knýttur at okkum á tænastu síðuni

**Verið vælkomin**

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35


## Fulltrúi hjá Løgtingsins umboðsmanni

Hjá Løgtingsins umboðsmanni er eitt starv sum fulltrúi leyst at søkja til setan frá 1. sept. 2004 ella eftir nærri avtalu.

**Embætið**
Umboðsmaðurin, ið virkar sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000, fór undir virksemi sítt 1. mai 2001. Uppgávan hjá umboðsmanninum er at hava eftirlit almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, herundir at viðgera klagur frá borgarunum um avgerðir v.m. Á skrivstovuni starvast í løtuni umframt umboðsmannin, ein løgfrøðiligur ráðgevi og ein skrivstovufulltrúi.

**Uppgávurnar**
Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:
- fyrireiking og viðgerð av innkomnum klagum
- uppgávur í sambandi við eftirlitskanningar av málsviðgerðini á útvaldum økjum, og
- kunningarvirksemi um fyrisitingarlig evni og um virksemið hjá umboðsmanninum.

Talan er um eitt rættiliga sjálvstøðugt og avbjóðandi starv.

**Setanartreytir**
Tann, sum settur verður, skal hava prógv sum løgfrøðingur. Stórur dentur verður harumframt lagdur á royndir eftir lokna útbúgving, og er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan almennu fyrisitingina.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Møguleiki er fyri setan sum ráðgevi, um førleikin og royndirnar eru til tess. Tann, sum settur verður, má tola møguligar broytingar í arbeiðsuppgávunum.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av prógvum v.m. skulu verða umboðsmanninum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 5. juli 2004, kl. 12.00.** Adressan er:

**Løgtingsins umboðsmaður**
Niels Finsensgøta 39 ·Postboks 1339
FO-110 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Joen H. Andreassen, umboðsmann ella Johnhard Klettheyggj, ráðgeva á tlf. 358500.

**Heimarøktin øki 5**
*Suðuroy*

## Avloysari til skrivstovuna

Søkt verður eftir avloysara til økisskrivstovuna frá 12. juli 2004 til 15. august 2004.

**Ynskiligt er at viðkomandi hevur:**
Skrivstovuroyndir, teldukunnleika royndir og kunnleika innan heimarøkt.

**Farloyvisstarv:**
Søkt verður eftir Heilsurøktara til Heimarøktina øki 5, at arbeiða 32 tímar um vikuna í skiftandi vaktum frá 1. september 2004 til 1. sept. 2006.
Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólkið í skipanini og við aðrar fakbólkar.

**Vit søknast eftir einum heilsurøktara sum:**
Hevur royndir innan heimarøkt
hevur hug og hegni at vera við í einari skipan, sum er í menning og broyting
evni at arbeiða sjálvsøðugt við ábyrgd
dugir at samskifta og hevur góð samstarvsevni
er før/ur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum

**Vit bjóða:**
eitt starv við møguleika at menna starvsinnihaldi
eitt spennandi arbeiðsplássi við nógvum røktarfakligum uppgávum
eitt gott arbeiðsumhvørvi
eitt starv har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og vera við til at menna sjúkrarøktina

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Um tú ynskir at vita meir um størvini ert tí vælkomin at ringja til økisskrivstovuna, tlf. 373907.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin øki 5**
**FO-900 Vágur**

**Umsóknarfreist:** 9. juli 2004


JBJ BYGGING
Har tykkara ynski verða sett í hásætið

*Alt innan timburarbeiði og stoyping verður gjørt skjótt og bíligt, um alt landið.*
•Sethús
•Umvælingar
•Stoyping av grundum v.m.
*Óbindandi tilboð verða givin*

*Eisini umboða vit nýggju amerikansku bjálkahúsini.*
*sí www.amerlog.dk*

JBJ BYGGING
Tel 213181
Tel 213182
Tel 213183
Oman Stóragarð 9
jbj@email.fo

Visti tú ikki tað? Sosialurin




**PF. VALDEMAR LÜTZEN**
Tel. 317920 · Fax. 321904

## Saknar tú eina veruliga avbjóðing?

Vit søkja eftir lærlingi til Byggimarknað okkara. Tað er ein fyrimunur, um tú dugir at arbeiða við teldum. Annars ynskja vit ein persón, ið dámar at hava við fólk at gera og er løtt/lættur í sinni.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi arbeiðspláss, har tú sleppur at royna teg við at avgreiða kundar okkara, ið altíð vænta sær eina góða tænastu hjá Valdemar Lützen Byggibúð. Eisini kemur tú at arbeiða innan: Lásaútgerð, amboð, urtagarð, fiskireiðskap og annað innan byggimarknað.

Um hetta hevur tín áhuga, send umsókn til:
**Valdemar Lützen Byggibúð**
Skálatrøð 14
Postboks 20
110 Tórshavn
Att.: Høgni Lützen

Í avgreiðsluni á Skálatrøð fæst umsóknarblað og samstundis kanst tú síggja handil okkara.
Umsóknarfreistin er tann 9. juli og lærutíðin byrj ar tann 19. juli 2004.

## Skála skúli

Søkt verður eftir lærarum til komandi skúlaár.

**Eitt** tíðaravmarkað starv við fullum tímatali, vegna avlopstímar, serligan tørv og lækkað tímatal.

Umsøkjarin skal helst kunna hava hesar lærugreinar, handaverk og list, gentufimleik og hollan teldukunnleika.

**Eitt** tíðaravmarkað starv við 10 tímum um vikuna vegna avlopstímar og lækkað tímatal.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 442118 ella 586005.

Umsóknirnar skulu vera Skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi leygardagin 3. juli 2004.

**Skúlastýrið fyri Skála skúla**
v/ Rosu Prestá
480 Skáli

## Vágs Bókasavn

Bókasavnið err stongt vegna feriu frá 5. juli og til 2. august.

**Vágs Bókasavn**
900 Vági
Tlf. 373991

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**
Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD - VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

## Avloysarastarv

Fyri starvsfólk í barnsburðarorlov, verður søkt eftir starvsfólki við umhvørvistekniskari, verkfrøðiligari ella náttúrfrøðiligari útbúgving til avloysarastarv á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Starvið umfatar viðgerð av málum innan karmarnar av umhvørvisverndarløggávuni, serliga innan viðgerð av umhvørvisgóðkenningum.

**Hetta merkir, at tú í tí dagliga kemur at arbeiða við at:**
- gera uppskot til umhvørvisgóðkenningar
- røkja umhvørviseftirlit
- gera uppskot til reglur og kunngerðir innan økið
- gera fakligar metingar av umhvørvisfrágreiðingum frá feløgunum
- fylgja við í altjóða gongdini innan umhvørvisvernd

Starvið er sera fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini, www.lnd.fo. Tú skal kunna byrja í starvinum eftir summarfrítíðina, og setanin er avmarkað til 31. apr. 2005.

Umsóknir við avriti av prógvi, viðmælum og CV skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 9. juli kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jacob Paula Joensen, deildarleiðara, ella Bárð Enni, stjóra.

## Lívbjargarar

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið 2 størv sum lívbjargarar við svimjihøllina við Fuglafjarðar skúla leys til setan tann 23. august 2004. Talan er um 1 kvinnuligan lívbjargara og 1 mannligan.

Arbeiðtíðin verður 13 tímar um vikuna hjá hvørjum.

Lønin verður ásett sambært sáttmálan millum Føroya arbeiðarafelag og Føroya arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsningar um størvini kunnu verða fingin til vega við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 444006 í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag.

Møguligar umsóknir skulu verða Fuglafjarðar býráð í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 2. juli 2004 kl. 15.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 10. juni 2004*
**Fuglafjarðar býráð**

UNITED seafood

## Maskinmaður

P/F Føroya Fiskavirking søkir eftir maskinmanni til virkið í Tórshavn.

P/F Føroya Fiskavirking Tórshavn framleiðir serliga tosk og upsa. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigið og fevna um m.a. catering og retail vørur eins og frystar ídnaðarvørur. Arbeiðið á Fiskavirking í Tórshavn fer fram sambært innaneftirlitsskipan.
Í 2003 virkaði virkið um 5.000 tons av rávøru, og uml. 3000 tons av góðskaðum vørum

**Uppgávurnar hjá maskinmanninum verða m.a.:**
- Røkja maskinur á virkinum
- Røkja viðlíkahaldsætlan virkisins

**Krav er at umsøkjari hevur:**
- Prógv sum maskinsmiðjur

**Fyrimun hevur umsøkjari ið hevur:**
- Góðan førleika innan el-skipanir
- Kunnleika til flakamaskinur
- Kunnleika til teldunýtslu
- Royndir frá líknandi arbeiði

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi
- Løn sambært avtalu

Vit kunna bjóða eitt arbeiði í mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum.
Umsóknarfreistin er 28. juni.
Allar umsøknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Ynski er at viðkomandi kann byrja sum skjótast.

Um áhugi er fyri hesum starvi so kunna tygum taka samband við :

**UNITED SEAFOOD,**
**P/F Føroya Fiskavirking**
att: Klæmint Klein
Postboks 218 · FO - 110 Tórshavn, Føroyar
Telefon 355555 · Telefax 312631

## Skálavíkar skúli

Hesi størv eru leys at søkja fyri skúlaárið 2004/05.

1 lærarastarv til serligan tørv, 8 t./v.
1 lærarastarv vegna avlopstímar, uml. 11 t./v.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2004/05, verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 1. juli.

**Skálavíkar skúlastýri**
v/ Signhild Jacobsen
FO-220 Skálavík

ARBEIÐSMARKNAÐUR á www.portal.fo